## Skuldu goyma rúsevnið

Kanningar hjá íslendsku løgregluni hava avdúkað, at menninir, sum royndu at smugla 40 kilo av amfetamini til Íslands í heyst, ætlaðu sær at goyma rúsevnið í einum summarhúsum nærhendis bygdini Hellu á Suðurlandinum. Kvinnan, sum eigur summarhúsini, er gift við einum manni, sum bleiv tikin í sambandið við smuglingina, men latin leysur seinni. Maðurin, sum skuldi leiga summarhúsini, situr í varðhaldi í Reykjavík.



## 246 mió. hava diabetes

Í dag er altjóða diabetesdagur, og í hesum sambandi skipar Diabetesfelag Føroya fyri fundi í Miðlahúsinum í Vágsbotni í kvøld klokkan 19. Á fundinum verður greitt frá diabetes í Føroyum fyrr og nú. Eisini verður farið út ein gongutúr at ganga minst 246 fet, fyri at minnast tær 246 milliónir fólkini í heiminum, sum nú hava fingið staðfest sjúkuna diabetes. Á odda gongur Heðin Mortensen, borgarstjóri í Havn.

# Sluppu undan stórari vanlukku

**Tað eitt lukkutreff, at ongin læt lív, tá ið ein stórur treylari trumlaði út yvir eina gongubreyt í Havn seinnapartin í gjár**

ÓHAPP

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*




*Tað kundi enda heilt galið, tá ið ein treylarin trumlaði yvir gongubreytina við rundkoyringinga yvir við Skansan í Havn seinnapartin í gjár*

Tað kundi enda heilt galið, tá ið ein treylari fór av kós í rundkoyringini á krossinum Jónas Broncksgøta og Yviri við Strond seinnapartin í gjár.

Treylarin var á veg av Hálsi í Havn oman eftir Ringvegnum Yviri við Strond. Treylarin skuldi oman á bryggjuna, haðani hann skuldi við Smyrli til Suðuroyar.

Men í rundkoyringini niðri við havnarlagið, brotnaði treylarin trumlaði inn yvir gongubreytina.

Var fólk til staðar á gongubreytini høvdu tey rætt og slætt ongan møguleika havt fyri bjarging, tí so høvdu tey fingið treylaran á seg og tað hevði ongin sloppið livandi frá.

Men lukkutíð var ongin stadddur á gongubreytini akkurát tá og sostatt slapst undan enn eini vanlukku.

Løgreglan sigur, at tað er staðfest, at førarin hevði ikki skyldina av óhappinum, tí hann hevði gjørt, sum hann skuldi.

Hinvegin er tað staðfest, at talan var um eitt tekniskt brek, sum førarin onki kundi gera við.

- Tað, sum hendi, var, at treylarin leyp upp úr lásinum á forvogninum og endaði yviri á gongubreytini, har hann skoraði seg fasyan upp í garðin.

- Onkursvegna sveik lásið, so at treylarin leyp upp úr mekanismuni og trumlaði yvir á gongubreytina, leggur hann afturat.

Løgreglan sigur, at tað kundi eisini hugsast, at lásið á forvogninum brotnaði, tá ið treylarin kom koyrandi við ferð eftir ringvegnum og so kundi hann rakt mótkoyrandi bilar og eisini tað kundi elvt til vanlukku.



*Tað var eitt tekniskt brek, sum førdi til óhappið, men tað var eitt lukkutreff, at ongin var fyri*



*Tað er at kalla dagligur kostur, at olja fer á sjógv á Havnarvág og í gjár hendi tað aftur*

# So hendi tað aftur: Oljudálking í Havnarvág

**Aftur í gjár fór olja á sjógv í Havnarvág, men løgreglan veit ikki, hvaðani hon stavar**

OLJUDÁLKING

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Í gjár hendi tað so aftur, at Havnarvág varð dálkað av olju, sum varð farin á sjógv.

Tað eigur ikki at koma fyri, at olja fer á sjógv, men í Havn er tað kortini at kalla gerandiskostur, at vágin er dálkað av olju.

Løgreglan í Havn sigur, at tað um fýra tíðina seinnapartin í gjár, at boðað varð, at olja fleyt í sjónum framvið Saltsøluni á Vestaru vág.

Sløkkliðið fór at taka upp og mett verður, at hesuferð var talan um nakrar hundrað litrar av gassolju, sum vóru farnir á sjógv.

Løgreglan sigur, at hon hevur ikki illgruna til nakran ávísan, sum kann hugsast at hava skyldina av dálkingini.

Hinvegin er roynd tikin av oljuni, tí kanningar kunnu staðfesta, hvaðani hon stavar. Tað merkir, at fær løgreglan illgruna til onkran ávísan, sum kann hugsast at hava skyldina av dálkingina, kann kanningarúrslitið staðfesta, um oljan stavar akkurát frá einum ávísum skipi, ella ávísum oljutanga.